# Spælimenninir til Japan



Angelika Nielsen úr Spælimonnunum er millum mest gávuríku føroysku fíólleikarar

**Spælimenninir eru ein av teimum føroysku bólkunum, ið hevur ferðast mest kring heim við tónleiki sínum. Í 2008 gongur leiðin til Japan saman við fiolleikaranum Angeliku Nielsen**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Langt áðrenn Eivør, Teitur, Týr, Høgni og Lena fóru útum landoddarnar var føroyskur fólkatónleikur á konsertferðum kring heimin. Her hava spælimenninir verið eitt av best umtóktu og virknastu umboðunum fyri føroyskan tónleik. Tí er tað sera hóskandi, at tað er júst hesin bólkur, ið hevur fingið møguleikan at verða fyrsti føroyski bólkurin, ið spælir í Japan. Konsertferðin verður sambært Kristiani Blak í 2008 og er komin í lag í samstarvi við Natsuko Terada úr felagsskapinum Harmony Fields, ið arbeiðir við at útbreiða norðurlendskan tónleik í Japan.

Felagskapurin setti seg herfyri við TUTL og bað um fløgur og dvd'ir við føroyskum tónleiki. Á hendan hátt kom konsertferðin í lag. Kristian Blak vónar, at hetta verður fyrsta konsertin av fleiri.

Spælimenninir, borga fyri eini framúr uppliving hvørja ferð. Festligi og trøllakendi spælimanstónleikurin kann fáa næstan ein og hvønn í gott lag. Tú kanst trampa, dansa ella hoppa, men illa standa stillur ella still, tá hendan orkumaskina setur futt í. Bólkurin spælir síðbundnan og modernaðan norðurlendskan og amerikanskan fólkatónleik. Hetta hava útlendskir fyrireikarar av fólkatónleikatiltøkum langt síðan latið eyguni upp fyri.

Spælimenninir hava spælt saman í fleiri enn 20 ár og hava verið á nógvum konsertferðum í Danmark, Svøríki, Orkunoyggjunum, Hetlandi, Skotlandi, Fraklandi, Finlandi og USA, har tey millum annað hava spælt á fólkatónleikafestivalum og øðrum konsertstøðum. Eisini hevur bólkurin spælt inn 8 útgávir. Nógvar av hesum hava selt sera væl í útlandinum.

Manningin hevur verið heldur skiftandi hesi árini, men ávís nøvn ganga aftur - kanska serliga Kristian Blak, Sharon Weiss og Ívar Bærentsen eru vorðin ímyndin av bólkinum. Men seinnu árini er unga Angelika Nielsen vorðin ein afturvendandi spælimaður. TUTL lýsir konsertferðina í Japan, sum Spælimenninir við Angeliku Nielsen.

Frálíka fiólspælið hjá Angeliku ger, at hon telist millum bestu yngru føroysku fíólleikarar.

Áhugin fyri føroyskum tónleiki í Japan byrjaði í fjør. Kristian Blak segði í vár við Sosialin, at í desember, januar og februar sendi plátufelagið TUTL pakkar við tilsamans 250 føroyskum fløgum til fløguhandilin Garden Shed í Tokyo. Talan var um fløgur við Eivør, Klakki, Enekk, Piniartut, Týr, Kára Sverrisyni, Clickhaze, Yggdrasil og sjálvt gomlu fólkatónleikaútgávuni Gluggamynd hjá Glataðu spælimonnunum og Sjómansrímur hjá Hans Andrias Djurhuus.

Vegna vaksandi virksemi og víðkað virkisøki søkja vit eftir

## verkfrøðingi/byggifrøðingi

**Í samstarvi við leiðsluna og onnur í fyrisitingini fevnir starvið í høvuðsheitum um:**

- Tilboðsrokning
- Fyrireiking av byggimálum
- Projektleiðsla
- Avseting og uppmáting

Fyri rætta fólkið er talan um eitt starv við spennandi avbjóðingum, sum geva góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning. Viðkomandi kemur at arbeiða í einum toymi av teknikarum og formonnum.

Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving innan verkfrøði og/ella byggitøkni, og helst nakað av royndum innan omanfyri nevndu arbeiðsøki. Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult. Góður kunnleiki til edv-skipanir, ið vanliga verða nýttar til tílík arbeiðir, er ein treyt.

Løn og setanartreytir vera samsvarandi útbúgving og royndum og annars eftir avtalu partanna millum.

Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til:

*P/F Articon*
*Postboks 3109*
*110 Tórshavn*

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 24. novembur 2006.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jón Danielsen, tel. 350 700 ella 210 683.

ARTICON
á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn
tel. 350700 · fax 350705

Articon-samtakið, sum eisini fevnir um Byggi-Service, er ein byggifyritøka í støðugari menning. Feløgini takast við alt slag av byggi- og annlegsarbeiðum - bæði størri og smærri. Somuleiðis gera vit eisini alt slag av apteringsarbeiðum umborð á bátum og skipum. Tað starvast í dag umleið 100 fólk hjá feløgunum báðum, býtt millum arbeiðsfólk, handverkarar, maskin- og lastvogns-førarar, formenn, byggi- og verkfrøðingar og skrivstovufólk. Feløgini hava skrivstovu í Tórshavn.

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

**KT-starv í Almanna- og heilsumálaráðnum**

Í samband við at talgilda heilsuskipanin, stytt THS, er í ferð við at verða innførd í heilsuverkinum, leitar Almanna- og heilsumálaráðið eftir starvsfólki til THS verkætlanina. Tú verður partur av prosjektleiðslutoyminum, sum hevur yvirskipaða ábyrgd av THS verkætlanini.

**Uppgávurnar hjá toyminum er í høvuðsheitum hesar:**
· Samskipa innkoyringina av THS í heilsuverkinum
· Kunna starvsfólk og fjølmiðlar um skipanina
· Skipanarfyrisiting
· Hava eftirlit við trygdini í skipanini
· Samskifta við veitararnar
· Menna og viðlíkahalda skjalatilfar
· Samskifta við Helpdesk
· Kunna seg um broytingar og samskipa uppstigingar og rættingar til skipanina
· Nároyna nýggjar tillagingar av skipanini
· Tillaga skipanina

Haraftrat er møguleiki fyri, at viðkomandi í framtíðini eisini fær tillutað aðrar kt-uppgávur fyri ráðið, so sum at luttaka í øðrum kt-verkætlanum, t.d. innan kt-trygd og uppstiging av verandi skipanum.

**Vit leita eftir umsøkjara sum:**
· Hevur nøktandi kt-útbúgving og/ella royndir innan kt.
· Dugir væl at samstarva
· Dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt
· Er væl skipaður.
· Harafturat er tað ein fyrimunur um umsøkjarin hevur royndir innan prosjektarbeiði.

**Vit kunnu bjóða tær:**
· Eitt spennandi og mennandi starv í eini av størstu KT-verkætlan, sum higartil er sett í verk í Føroyum.
· Eitt nýtt starv, har tú verður partur av einum dynamiskum toymi, har tú í stóran mun sjálv/ur sleppur at mynda tín leiklut í toyminum.
· Eitt spennandi og mennandi arbeiðspláss har dentur verður lagdur á trivnað og skipaða førleika menning.
· Skipað verður fyri førleikamennandi tiltøkum í fyrisiting av THS-skipanni og í øðrum týðandi økjum hoyrandi til starvið.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.
KT-starvsfólkið fær tilvísing til KT leiðaran.
Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.
Fyri at frætta nærri um starvið eru viðkomandi vælkomin at venda sær til Nicolai M. Balle, kt-leiðara, á telefon 304050 ella á teldupostbústaðnum **nicolai@ahr.fo.**

Umsóknir við avriti av viðkomandi prógvum og skjølum skulu sendast til:
Almanna –og heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn.

Og verða okkum í hendi í seinasta lagi 5. desembur 2006 kl. 12.00